# EIN RÚTUR ER IKKI BARA EIN RÚTUR AT HYGGJA ÍGJØGNUM

## - Vit gera alt eftir máti, so framleiðslan passar til tørvin hjá viðskiftafólkunum, sigur framleiðslustjórin hjá Atlanticpane við Ósábakka í Kollafirði, Dan Jacobsen

Vilmund Jacobsen

Á Atlanticpane, sum liggur við Ósábakkan í Kollafirði, arbeiða 12 fólk við glasi og ymiskum virksemi, sum hevur við glas og rammur at gera. Hetta hevur verið manningin seinasti árini og nøkur av teimum, sum arbeiða hjá fyritøkuni í dag, hava starvast her, síðan Atlanticpane flutti úr Vestmanna til Kollafjarðar í 1983.

P/F Atlanticpane er stovnað í Vestmanna hin 20. september í 1973, og øll tey fyrstu árini helt virksemi til í Vestmanna.

Stovnarar vóru Rubeck Jacobsen, Tórur Joensen og Sigbjørn Petersen.

Í 1983 keyptu Karstin A. Joensen, Magnus O. F. Jacobsen og Ovin Klein Olsen felagið og fluttu teir alt virksemi til Kollafjarðar, har tað hevur verið síðani.

Um søgu felagsins er at siga, at Atlanticpane í september 2001 flutti í betri og rúmligari umstøður í nýggjum bygningi, sum liggur við Langasand 2 í Kollafirði.

Í oktober í 2006 fekk felagið aftur nýggjar eigarar og teir, sum eiga Atlanticpane í dag, eru Heðin Zachariassen, sum er stjóri og Dan Jacobsen, sum er nevndarformaður og framleiðsluleiðari.

### Serkønir í glasi

Dan Jacobsen sigur, at høvuðsframleiðslan hjá Atlanticpane er termorútar til vindeygu og hurðar. Haraftrat ger fyritøkan nógvar glasveggir, serliga til skrivstovubygningar, útbygningar úr glasi, ymiskar glasflatur, sum verða brúktar til eitt nú trappur, bæði innan-og uttandura – og brúsukabinur úr glasi.

- Vit keypa ikki termorútar úr útlandinum, men keypa glas av ymiskum slagi og í stórum stykkjum úr Danmark. Síðan verður alt skorið og sett saman her hjá okkum. Hetta merkir, at øll framleiðslan fer fram á virkinum.

Atlanticpane ger soleiðis allar termorútarnar til H-Dygd í Vatnsoyrum, GLT Træsmiðjuna í Havn og til nógvar aðrar veitarar, sum arbeiða við ymiskum sløgum av termorútum og glasi annars.

Dan Jacobsen sigur, at Atlanticpane ger eisini nógv fyri privatfólk, og er tað so, at fólk eru ótrygg um mát, fara fólk hjá fyritøkuni út at máta upp.

- Vit senda fólk út at máta upp, antin tað eru vindeygu, veggir, útbygningar, brúsukabinur ella aðrar glasflatur, og síðan fara vit útaftur at seta upp, um fólk ynskja tað. Vit gera alt eftir máti, so framleiðslan passar eftir tørvinum hjá viðskiftafólkunum, sigur framleiðslustjórin.

Hann vísir á, at fyritøkan á Langasandi í Kollafirði eisini ger nógvar ymiskar rammur og setir í rammu fyri fólk.

- Vit hava eitt fólk, sum burtur av tekur sær av hesum og ymiskum øðrum hugsandi og óhugsandi, sum hevur við glas at gera, leggur Dan Jacobsen aftrat.

### Lágorkuglas

Venda vit aftur til termorútarnar, sum er høvuðsframleiðslan hjá Atlanticpane, er alt lágorkuglas, sum verður sett í vindeygu.

- Tá tú hyggur út gjøgnum eitt vindeyga, hugsar tú ikki, um hetta er lágorkuglas ella bara vanligt glas. At eitt vindeyga er gjørt úr lágorkuglasi, merkir, at rúturin lovar hitanum væl inn, men vil treyðugt lova honum útaftur.

Dan vísir á, at termorútar verða roknaðir við tí, sum rópt verður u-virðið.

- Fyrr høvdu vanlig termovindeygu eitt u-virði sum var 2,8, men í dag hava allir termorútarnir, sum vit framleiða, eitt u-virði, sum er 1,1. Jú, lægri talið er, tess minni hiti sleppur útaftur. Aðrir rútar fáast eisini, sum eru samansettir av trimum løgum, og hesir hava eitt u-virðið, sum liggur heilt niðri á 0,5.

Framleiðsluleiðarin sigur, at eitt lágt u-virðið hevur stóran týdning fyri, hvussu væl rúturin heldur hitanum inni í rúminum. Hetta hevur so aftur sín týdning fyri orkunýtsluna.

- Fyri umleið einum ári síðan fóru vit eisini í holt við at gera ein sonevndan hitakant, sum er ein avstandslisti millum báðar rútarnar í einum termorúti. Hetta gevur ongan meirkostnað fyri viðskiftafólkini.

Dan Jacobsen sigur, at hitakanturin ger ongan mun fyri sjálva bjálvingina, men minkar um kondens í vindeyganum.

- Termorútarnir eru góðir, men eins og í øðrum framleiðslum er eisini framgongd í hesi framleiðslu alla tíðina, samstundis sum roynt verður at gera tingini betri og betri, sigur framleiðsluleiðarin á Atlanticpane í Kollafirði.

vilmund@sosialurin.fo


*Atlanticpane arbeiðir við øllum hugsandi og óhugsandi úr glasi*

## Fakta

**Atlanticpane framleiðir ikki bara termorútar, men eisini -**

- einkultgløs
- spegl
- sólverju
- bátarútar
- maskinrútar
- rammur og innramming
- laminering av myndum og plakatum
- ferðslu-og trygdarspegl

